

*Eftir steðgin søktu okkara oftani móti kypriotiska brotsteiginum, men fyri tað nógva merkti vantandi tol, at trýstið í alt ov lítlan mun varð hildið fast*
Mynd: Álvur Haraldsen

valdi at spæla tvørtur um á miðvøllinum. Tað kostaði, soleiðis at kypriotar kundu fara í kontra, og so komu mistøkini í fullari røð. Fyrst seldi Byrial seg fullkomuliga, og síðani var tað Atli, sum átti tørn. At enda varð bólturin spældur inn til Constantinou, men hóast hesin ikki stóð serliga væl fyri, og hóast skotið ikki var serliga hart, so slapp bólturin onkursvegna at ferðast inn um ein sera passivan Jens Martin Knudsen í føroyska málinum.

Tað var sum vátur vøttur hjá okkum, men løtu seinni fingu áskoðararnir kortini vónina aftur. Lefteris Eleftheriou hevði fyrr í dystinum fingið gult kort, tá hann púra óneyðuga vildi seinka føroyskum innkasti, og tá hann so sópaði beinini undan Mortan úr Hørg, sum breyt ígjøgnum í borðinum, hevði dómarin einki val. Seinna gula og harvið reyða kortið til kypriotiska verjuspælaran, og so skuldi forteytirnar verið betri.

## Vantandi tol

Fyrstu longu løtuna eftir steðgin var eisini nógv, sum bendi á, at føroyingar í minsta lagi skuldu fáa javnleik.

Hóast Todi Jónsson hevði tikið seg úr dystinum, tá hann kendi nakað av eymleika í vøddunum, so darvaði hetta als ikki so nógv, sum óttin var fyri. Ikki minst tí Christian Høgni var so tendraður, sum sjáldan sæð fyrr. Hann stressaði mótstøðuverjuna, tá teir høvdu bóltin, og hann sýndi bæði dirvi og frekleika, tá hann bjóðaði av, og so líðandi fóru álopini at skola oman móti mótstøðumálinum. Mortan hevði dundurskot, sum rakti stólpan, Jákup á Borg misnýtti skammiliga, tá Christian Høgni stakk hann púra blankan, og sjálvur hevði Christian Høgni eisini góða atsókn, sum tó streyka upp um málið.

Høvdu føroyingar megna at hildi trýstinum, so hevði tað ivaleyst borið útjavning við sær, men máltalvan staðfestir, at so varð ikki. Og tað hevði so eisini sínar orsøkir.

Ein var, at føroyski miðvøllurin í nógvar mátar sýndi ov lítið av toli í spælinum. Har var sjáldan nakar, sum hekk eftir í tómrúminum uttan fyri brotsteigin, og tí sluppu kypriotar oftani avstað við næstu-bóltunum, tá hesir vóru stútaðir og blokkaðir úr brotsteiginum. Hartil megnaðu okkara í alt ov lítlan mun at koyra bóltin skjótt runt, soleiðis at kypriotar kundu renna seg móðar.

Taktiskar útskiftingar áttu helst at verið gjørdar longu tíðliga eftir steðgin, men tá tvær av hesum longu vórðu nýttar, valdu venjararnir heldur at goyma seinasta møguleikan. Ístaðin varð roynt við ymsum taktiskum variantum, men tað gjørdi sjáldan nakran mun. Uppspælið gekk fyri tað nógv alt ov seint fyri seg, og tá spælt varð ígjøgnum, var góðskan í innleggunum alt ov vánalig. Mest sum hvørja tí einastu ferð kundi fremsti kypriotiski verjuspælarin stúta ella sparka burtur, og so er trupult at koma til veruligar møguleikar. Eisini hóast Christian Høgni fekk ein slíkan, tá hann púra blankur stútaði einasta staðið, sum hann ikki skuldi stúta.

## Skútan sakk

Sum dysturin leið, og okkara í alt minni mun megnaðu at trýsta mótstøðuna, so minkaðu sannlíkindini fyri, at dysturin skuldi venda. Og eitt korter fyri dystarlok fall so avgerðin. Aftur var talan um púrasta óneyðuga gávu frá okkara síðu, tá Mortan heilkiksaði, tá hann heldur átti at stúta aftur til Jens Martin. Okkas slapp ígjøgnum, og tá Jens Martin varð fangaður á millumhond, kom brotsspark burturúr.

Tað varð sett í netið, og at Kypros so í yvirtíðini økti til 3-0, var bara við til at styrkja um føroysku ímyndina av dystinum. Flestu áskoðararnir vóru langt síðani farnir av vøllinum, tá Charazambous og Makridis broderaðu seg ígjøgnum føroysku verjuna, og framman fyri skralltómum máli kundi Krassas valla lata vera við at skora. Tá vóru føroyingarnir eisini skerdir, eftir at Mortan noyddist av vølli eftir eina eftirtackling av fúlara slagnum, men tá kundi tað mesta eisini vera líkamikið. Føroyska liðið hevði enn einaferð tapt ein fótbóltsdyst, men hesaferð var talan um tap av tí heilt óneyðuga slagnum. Hatta var ein dystur, sum vit als ikki skuldu tapt. Bæði tí mótstøðan ikki var nakað betri enn okkara, og ikki minst, tí vit so leingi spældu í yvirtali.

So er bara at vóna, at tað fer at gangast betri í Fraklandi um góðar tvær vikur. Í øllum førum eru flestu negativu lýsingarorðini nú uppbrúkt, so vónandi fær yvirskriftin ein annan tóna til ta tíð.



*Vónirnar til Toda Jónsson vóru stórar, og fyrstu góðu løtuna var eisini líkt til, at hann skuldi levera vøruna*
Mynd: Álvur Haraldsen